

Sosialurin - 311820

# Gravsteinar og kantsteinar. Nú eisini úr føroyskum gróti

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað



**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo



# FRAGD & FIMI

Tað besta tú kanst bjóða tær sjálvum

Klænkiskeið
Styrkivenjing
Turbo Solarium
Kondivenjing
Spinning
Bað

**SPINNING** er sera gott fyri ♥ - **lungu og blóðrensl** - er ein ógvuliga góður háttur at klænka seg uppá, kann íðkast av øllum, eisini av teimum við veikum liðum og ryggi, er ein góður háttur at stimbra konditiónina uppá, um tú eisini íðkar annan ítrótt, so sum øll sløg av bóltspæli, súkklar, rennarar, rógvarar, áðrenn tú skalt á skíðferiu o.s.v.

**Nýtt skeið í SPINNING byrjar 8. januar og halda vit á til 8 apríl - tíðirnar eru hesar:**

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| 17.30-18.30 fatburner | 17.30-18.30 vand | 17.00-18.00 fatburner | 17.30-18.15 byrjarar | 15.00-16.00 week-end burner |
| 18.30-19.15 klænkiskeið* | 18.30-19.15 byrjarar | | 18.30-19.30 vand | |

Eisini kunnu feløg, virkir, skúlar o.o. bileggja spinningtímar við instruktøri. Ring og hoyr nærri.

Møguligar broytingar kunnu koma fyri

**Instruktørar eru: Jana - Anja - Amanda - Sanna**

| Kostnaður fyri alt skeiðið | | Kostnaður pr. ferð | |
|---|---|---|---|
| 1 x vikuna kr. | 490,- | 1 ferð | kr. 50,- |
| 2 x vikuna kr. | 790,- | 10 ferðir | kr. 400,- |
| 3 x vikuna kr. | 1.050,- | 10 ferðir limir | kr. 275,- |

***KLÆNKISKEIÐ**
Byrjar aftur 15. januar og halda vit á til 11. mars.

**SPINNING**
Mánadag kl. 18.30-19.15

**STYRKIVENJING**
Hósdag kl. 18.00-19.30.
Kostnaður fyri alt skeiðið kr. 798,- incl. feitt test, kostráð, vegleiðing.

**TILMELDING**
Støkk inn á gólvið.
Ring tlf. **317100 - 318819**
ella e-mail

**UPPLATINGARTÍÐIR:**
Mánad.-mikud.-fríggjad. kl. 12-21
Týsd.-hósd. kl. 7-10 og kl. 15-21
Leygardag kl. 14-17



**FRAGD & FIMI**
Dj. í Geilsgøta 5
100 Tórshavn
**Tlf. 31 71 00**
e-mail:
fragd@post.olivant.fo
Heimasíða:
Fragd.olivant.fo


# Avloysari fyri skrivstovufólk í Løgtinginum

Eitt avloysarastarv fyri skrivstovufólk í farloyvi er leyst at søkja. Tíðarskeiðið er frá 1. mars 2001 til 1. mars 2002.

Uppgávurnar eru í høvuðsheitum hesar: Telefonavgreiðsla, ávísingar, ferðaforskot og ferðauppgerðir, fráboðan til og skráseting av nevndarfundum og onnur skráseting í sambandi við løgtingsarbeiðið, harumframt annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Tann, ið settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving ella samsvarandi útbúgving ella royndir á økinum. Ein treyt fyri at verða settur er, at viðkomandi er kønur í føroyskum og hevur royndir at arbeiða við teldu. Umsøkjarar, sum hava kunnleika til Access hava fyrimun.

Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálstýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu vera Løgtinginum, Erling Jallsgøta 6, Boks 208, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. januar 2001 kl. 16.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Thurid Debess, skrivstovuleiðara, tel. 3110 00."

L. v.

Súsanna Danielsen
stjóri

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir einum reingerðarfólki til Leirvíkar Skúla at byrja 1. februar 2001.

Umsóknir skulu vera Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. januar 2001.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006.

*Leirvík tann 4. januar 2001*
**Leirvíkar Kommuna**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Ford Fiesta 1,2 55 KW 3 hurðar
**Árg.:** 1997
**KM.:** 39.835
**Eyka útgerð:** Sentrallás, airbag, omd.teljari, servostýring og startsperra

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
Tlf. 345600 – lokal 728
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 10.00–12.00




Sosialurin - 311820

# Stóra bringu
-ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-støddˀ?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína støddˀ. Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610





Sosialurin - 311820

**Hydraulikkhamarar 10-30 kg**
*Mobilar drivstøðir*
*Lítlar og handingar*
*Høgan effektiviter*
*Ristast lítið*
*Fleksibul íbinding*

Leverandørur til entreprenørar í 28 ár... Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008



**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Sí SVF tekstvarp s. 650




# Skeið fyri fólk innan byggifakið í jarnbinding

**19.–23. mars 2001 í Tórshavn og 26.–30. mars 2001 á Tvøroyri**

um nóg stór luttøka verður

**Undirvíst verður í:**
Tekningsfatan – klippi- og bukkilistar – teknikkur – armeringsuppgávur

**Skeiðleiðarar:**
Frá AMU-Centrið Vendsyssel

**Skeiðkostnaður:**
Kr. 6.500 (skal gjaldast við tilmelding)

**Tilmelding:**
Áðrenn 20. januar 2001

Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir nýggjari reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag–fríggjadag, kl. 8–12 & 13–16)

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621
Teldupostur: mb@tst.fo

# Umlættingarfólk

Søkt verður eftir umlættingarfólki til 5 ára gamalt barn, sum krevur hjálp til alt.

Arbeiðið fevnir um at umlætta familjuna og geva barninum eitt innihaldsríkt vikuskifti.

Arbeiðstíðin er eitt vikuskifti um mánaðin og skal tað vera heima hjá umlættingarfólkinum, helst í Eysturoy.

Setunartíðin er frá uml. 15.02.01.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og í seinasta lagi 21.01.01 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Eysturoyar deild
att. Birita Viderø
Heiðavegur
600 Saltangará

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 314822, Ragnhild Dahl.

**SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ RASMUSSEN & WEIHE**

# Bókhald

Fyri ein av kundum okkara í Tórshavn søkja vit eftir einum fólki til bókhald og skrivstovuarbeiði.

Arbeiðið umfatar bókhald og annars alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Bert eitt fólk starvast í bókhaldinum. Tann, ið setast skal í starvið, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, og praktiskar royndir og kunnleiki til bókhald eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu í seinasta lagi 15. januar 2001 sendast til Rasmussen & Weihe P/F, sum eisini kann geva nærri upplýsingar um starvið.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir 1 stuðulspedagogi/hjálpara til 10 ára gamalt barn í Klaksvík.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður at stimbra barnið bókliga, sosialt og annars at gera dagin innihaldsríkan hjá barninum.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna og barnaverndina. Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna og fyribils í 3 mðr.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Irenu Olsen á tlf. 456388.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvi verða at senda til:

**Barnaverndarnevndina**
**Klaksvíkar Kommuna**
Postboks 2
700 Klaksvík

Í seinasta lagi tann 20. januar 2001.

# Próvdómari

Á Koyrikortsdeildini á Bileftirlitinum, er eitt starv sum próvdómari í koyrikortsmálum leyst at seta skjótast gjørligt.

**Starvslýsing:**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- fyriskipan av koyrirøyndum
- próvdøming av ástøðis og verkligum koyrirøyndum
- dagføring og tilrættaleggjan av próvtilfari
- dagføring og tilrættaleggjan av frálærutilfari
- dagføring av lógum og kunngerðum á koyrikortsøkinum v.m.

**Førleikakrøv:**
Tann sum settur verður í starvið, skal:
- hava góð samstarvsevni
- hava evni og áhuga at arbeiða við fólki
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- kunna taka sjálvstøðugar avgerðir
- helst hava royndir innan frálæru og námsfrøði
- helst hava kunnleika til ferðslulógarøkið

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Bjarna Sørensen, deildarleiðara ella Jákup Jacobsen, stjóra á tlf. 350 400.
Umsóknir saman við prógvum, starvsroyndum og viðmælum skulu vera Bileftirlitinum í hendi í seinasta lagi 10. januar 2001.

**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Stovnurin er skipaður í 3 deildir. Umframt høvuðssæti í Tórshavn, hevur stovnurin sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 17 fólk.

# Pedagogar

Søkt verður eftir einum pedagogi 35 ella 40 tímar og einum pedagogi 35 tímar frá 1. februar 2001 ella eftir nærri avtalu. Søkir ongin pedagogur hava vit hjálparfólk til størvini.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur við 3 stovum. Á hvørjari stovu eru 20 børn, 2 hjálparfólk og 1 pedagogur.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri, lønarflokk 11/13, stig 16.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran, tlf. 317878.

Umsóknarfreist
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal vera okkum í hendi seinast 22/1-2001.

**Barnagarðurin á Konmansmýru**